# Barsskor syngur svanasong sín

Eftir at hava røkt rutusambandið til Kalsoynna í mong er siglingin hjá Barsskor nú at enda komin. Nútíðin setur onnur krøv til flutning av ferðafólki, og nú fer Sam at røkja siglingina ístaðin. Vit vóru við Barsskor hósdagin, tá Barsskor sigldi ein av sínum seinastu túrum.



*Sigmar Høgnesen hevur ført Barsskor í tvey ár. nú fer hann umborð á Sam*

SAMFERÐSLA

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Bárður Lydersen*

**Kalsoyar-rutan:** Klokkan er 13:20 stundisligt, tá vit henda hósdagin leggja frá landi í Klaksvík.

Leið 56 hjá Strandferðsluni við skipinum Barsskor er enn einaferð løgd frá landi, eins og gjørt hevur verið tey seinastu mongu árini.

Teir á Barsskor eru altíð í góðari tíð, og henda góðveðursdagin er einki undantak í so máta. Í dag er Sigmar Høgnesen skipari, meðan Noel Joensen syrgir fyri maskinu, ferðafólki og farmi.

Henda leiðin er kend fyri hetta strandfaraskipið, sum varð bygt í Íslandi í 1929. Ár eftir ár hevur Barsskor verið álitið hjá kalsoyingum í sambandinum við Klaksvíkina.

Hesin túrurin hósdagin kl. 13:20 er tó ein av teimum seinastu hjá Barsskor sum ferðafólkaskip og sambingindarlið millum Klaksvík og Kalsoynna.

Týsdagin í næstu viku er henda siglingin hjá Barsskor nevniliga av. Tá verður nýggja samferðsluhavnin á Syðradali tikin í nýtslu, og samstundis fer Sam hereftir at røkja sambandið millum Klaksvík, Syðradal og Leirvík.

Eingin veit, hvat gerast skal við Barsskor eftir seinasta túrin í næstu viku. Men mong munnu vera, sum koma at sakna tann serliga stemningin og ta serligu hygguna, sum var umborð millum ferðafólkini á ferðini um fjørðin.

Tann gamla tíðin má víkja fyri krøvunum frá nútíðini. Barsskor verður nú lagdur, og kann siga takk fyri 76 góð ár á hesi farleiðini.

## Sum eitt skip

Hóast Barsskor er gamal í garði, so er skiparin, Sigmar Høgnesen ikki eina løtu í iva um, at hetta er eitt ótrúligt far til hesa farleiðina.

– Eftir støddini er hann sera góður í sjónum – fyri ikki at siga ótrúliga góður.

– Eg vil siga tað so, at hóast hann ikki er millum tey allar størstu fartoyini, so er hann næstan sum eitt skip at sigla við, sigur Sigmar.

Hinvegin so kann Sigmar bara staðfesta tað sama, sum so mong onnur, at eitt skip sum er gamalt og gongur á 76. ári, ikki er serliga hóskiligt til nútíðina og til tey krøvini, hon setur til flutning sjóvegis.

Men hetta hevur kortini verið eitt sera trygt skip til hesa



*Barsskor er álitið hjá kalsoyingum, soleiðis at fólk kunnu arbeiða í Klaksvík, men kortini búgva á Húsum og hinum bygdunum í oynni*